## Laudrup ger um seg

Triðja ættarliðið av Laudrup-familjuni er so sma´tt við at gera um seg. Sunnudagin var 18 ára gamli Andreas Laudrup maðurin, sum legði upp til sigursmálið hjá FCN móti Sønderjyske, og venjarin, Morten Wieghorst, var skjótur fram við rósunum. – Hann hevur tikið seg nógv fram, og eg ivaðist, um eg skuldi brúka hann longu frá fyrsta bríksli. Tað gjørdi Wieghorst tó ikki, men tað tók lítla Laudrup bert fýra minuttir at seta sítt fingramerki á dystin, tá hann legði upp til málið, sum samstundis var tað fyrsta hjá Sibusiso Zuma, síðani hann kom aftur til danskan fótbólt.



## Ronaldo skal við Portugal

Hóast hann hevur verið skaddur í fleiri vikur,so er navnið hjá Cristiano Ronaldo í hópinum, sum Carlos Queiroz hevur tikið út til play off-dystirnar hjá Portugal móti Bosnia/Herzegovina. Ronaldo hevur annars júst verið hjá hollendskum serfrøðingi, sum sigur, at enn er eingin framgongd at hóma í skadda fótliðinum, men Qeiroz sigur, at Ronaldo er somikið týðandi hjá teimum, at hann hevur hann við í hópinum í vónini um, at hann er til reiðar at spæla.

# Styrkt U21-landslið til EM-dystir

**Seinni henda mánaðin spælir U21-landsliðið í fótbólti ársins seinastu EM-útidystir ímóti Lettlandi og Andorra. Til ferðina er liðið styrkt við Jóhan Troest Davidsen og Boga Løkin, sum eru royndir A-landsliðsspælarar, men enn hava aldur til U21**




Hilmar Jan Hansen

Hóast føroyska kappingin langt síðani er liðug, eru nógvir av yngru spælarunum framvegis í gongd, tí enn eru tveir útidystir eftir hjá U21-landsliðnum í ár. Talan er um Lettland í Riga mikudagin 18. november og Andorra leygardagin 21. november. Síðani verður ein steðgur, til spælt verður aftur 11. august næsta ár.

– Spælararnir skulu hava rós fyri, at teir hava verið so hugagóðir, tí síðani landskappingin endaði, hava vit vant tríggjar ferðir um vikuna. Talan hevur verið um nógva konditiónsvenjing, umframt at vit hava spælt tveir venjingardystir ímóti EB/Streymi og B68, sum vit í báðum førum vunnu 2-1, sigur Heðin Askham, ið saman við Bill McLeod Jacobsen er venjari hjá U21-landsliðnum.

Hann er spentur til hesa seinastu landsliðsferðina í ár, og hóast spælararnir ikki hava ta vanligu dystarvenjingina, eru vónirnar góðar um at enda árið á besta hátt.

– Lettland kenna vit jú sum eitt gott lið, men so er tað Andorra, ið er niðast í okkara bólki, men kundi sæð út til at verið eitt lið, ið hóskar okkum væl. Serliga henda dystin eru vit spentir til, og hóast vit ikki vilja kanna okkum bitan, áðrenn hann er svølgdur, so síggja vit ein møguleika í tí dystinum, sigur venjarin.

Hann og Bill McLeod Jacobsen hava tikið út 18 spælarar, ið fyri tað mesta eru spælarar, vit í ár hava sæð á U21-landsliðnum. Men tvey undantøk eru tó, tí eisini eru Jóhan Troest Davidsen og Bogi Løkin, sum báðir eru fastir A-landsliðsspælarar, tiknir út til teir báðar útidystirnar.

– So leingi, sum spælararnir hava aldur til U21-landsliðið, kunnu vit brúka teir. Og júst Jóhan og Bogi eru tveir spælarar, ið supplera liðið hjá okkum øgiliga væl. Vit ætlaðu eisini at fáa Einar T. Hansen og Levi Hansen við, men teir hava so givið avboð, sigur Heðin Askham.



Heðin Askham og Bill McLeod Jacobsen hava styrkt sær U21-landsliðið við Jóhan Troest Davidsen og Boga Løkin (myndin), ið annars teljast millum føstu menninar á A-landsliðnum

Mynd: Álvur Haraldsen

### FAKTA

**U21-landsliðshópurin**

Øssur Dalbúð, ÍF
Dánjal Davidsen, EB/Streymur
Jóhan Troest Davidsen, NSÍ
Jóan Símun Edmundsson, B68
Johan Ellingsgaard, B36
Hallur Hansson, Aberdeen FC
Rógvi S. Holm, Aberdeen FC
Róaldur Jacobsen, B36
Jóan Pauli Dahl Jakobsen, B36
Kristoffur Jakobsen, EB/Streymur
Finnur Justinussen, Víkingur
Pól Johannus Justinussen, B68
Hans Jørgensen, HB Køge
Pætur T. Jørgensen, HB
Bogi Løkin, NSÍ
Karl Løkin, NSÍ
Christian Restorff Mouritsen, B36
Rógvi Poulsen, HB

# Kvinnurnar stóra avbjóðing

**A-landsliðið í kvinnufótbólti skal tíðliga í vár við til kapping í Portugal, har øll tey bestu kvinnulandsliðini í heiminum eru við. – Hetta er ein øgiliga stór avbjóðing, men væntandi eisini ein stór uppliving, sigur kvinnulandsliðsvenjarin, Álvur Hansen**




Hilmar Jan Hansen

Í døgunum frá 24. februar til 3. mars fær kvinnulandsliðið í fótbólti sína størstu avbjóðing higartil, tá kvinnurnar skulu við til eina kapping í Algarve í Portugal, sum annars telur sterkastu londini í heiminum. USA, Týskland, Kina og tey altíð sterku norðurlondini hava í fleiri ár havt hesa kapping, sum nú er víðkað við einum bólki, ið ikki er fult so sterkur.

Tað er Portugal, sum hevur tikið stig til at fáa triðja bólkin upp í kappingina, og í komandi kappingini verða Rumenia, Eysturríki og Føroyar eisini við í hesum bólkinum. Rumenia og Eysturríki eru styrkimett sum ávikavist nummar 21 og 22 í Europa, Portugal sum nummar 25 og Føroyar sum nummar 35.

– Vit hava í eina tíð roynt at ligið framvið, og nú eydnaðist okkum so at sleppa upp í part. Tað var nokk so heppið, tí hetta eru sterk lond og stórur áhugi er fyri at sleppa við. Men hini hava kanska hoyrt um ta framgongd, vit hava havt, og tí eru vit sloppin upp í part, sigur Álvur Hansen, landsliðsvenjari hjá kvinnulandsliðnum.

– Hetta er ein øgiliga stór avbjóðing, men væntandi eisini ein stór uppliving. Ikki minst, tí okkara spælarar hesar dagarnar verða partur av einum fótbóltsumhvørvi, ið telur teir avgjørt bestu spælararnar í heiminum. Vit eru ikki við í komandi HM-undankappingini, so tað kemur væl við, at vit so í staðin fáa henda møguleikan.

Av tí at kappingin er um mánaðarskiftið februar-mars, er hetta uttan fyri landskappingartíð hjá føroysku spælarunum, men tað ger so bara, at farast má undir venjingina hjá kvinnunum í góðari tíð.

– Hesi seinnu árini eru í øllum førum tey bestu liðini byrjað tíðliga við sínum venjingum, so tá nú henda avbjóðingin er komin á skránna aftrat, vænti eg ikki, at tað verður so trupult at fáa spælararnar í gongd í góðari tíð. Og í øllum førum fara vit at hava fleiri felagsvenjingar, so liðið verður so væl fyri, sum tað ber til, sigur Álvur Hansen.

### FAKTA

**Kvinnukappingin**

**Bólkur A:** Týskland, Kina, Finland og Danmark
**Bólkur B:** USA, Norra, Svøríki og Ísland
**Bólkur C:** Portugal, Rumenia, Eysturríki og Føroyar

Kappingin er skipað við einum bólkaspæli, har londini spæla tríggjar dystir. Síðan verða plaseringsdystir, har nummar 1 í bólki A og B spæla finalu og hini um plaseringarnar. Eittarin og tveyarin í bólki C spæla ímóti fýrarunum úr bólki A og B. Og at enda spæla tríarin og fýrarin í bólki C ein dyst aftrat, so øll londini fáa fýra dystir.